## EG MEINI TAÐ

# Vit mugu fordøma danir!



*Niels Uni Dam skrivar:*

Eg meini, at Føroyar eiga at vísa umheiminum, at vit ikki kunnu stuðla fremmandahatrinum hjá dønum. Nýggi útlendingapolitikkurin hjá donsku stjórnini hevur longu sett Danmark í andstøðu í Evropa, og ynskja vit ikki somu lagnu, noyðast vit at gera heimin varugan við, at vit ikki stuðla fremmandahatri.

Nýggja uppskotið hjá donsku stjórnini býtir danska fólkið upp í fyrstaflokks borgarar og annanflokks borgarar. Hetta er eitt tað størsta alment stýrda rasistiska átakið í Vesturevropa síðan annan veraldarbardaga og skal síggjast sum ein bleytari og tillagað útgáva av apartheid.

Tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn onkur dregur Danmark fyri ST-mannarættindadómstólin og vinnur sakina. Tað er ikki torført at skilja, hvat hetta hevur við sær, tá talan er um útflutning og altjóða samstarv annars.

Ynskja vit sum føroyingar ikki at vera ein partur av hesum, mugu vit gera vart við hetta og tað nú. Hvussu fer eitt handilsboykott av Danmark at ávirka okkum?

Neyðugt er at Føroya Landsstýri eru undangongumenn í altjóða átøkunum móti Danmark, hetta vísur altjóða samfelagnum at vit sum føroyingar ikki stuðla fremmandahatri, og ikki velja at síggja onnur fólk sum annanflokksborgarar bara tí danska stjórnin sigur tað.

Seinastu nógvu árini hevur Danmark havt nógv tí harðastu útlendingalógina í Vesturevropa, og hetta hevur bert ført alsamt verri integratión við sær. Síðsta danska stjórnin við sokallaða sosialdemokratinum Poul Nyrup Rasmussen á odda kappaðist við Dansk Folkeparti um at spreiða fremmandahatur. Hetta skapti ein hatskan hugburð í stórum parti av danska fólkinum. Tá ein penur sosialdemokratur kundi føra ein tilíkan politik, so var hann nokk ikki galin.

Tað er tí nú sera torført hjá fólki av øðrum uppruna enn donskum at fáa arbeiði í Danmark. Ung fólk av øðrum uppruna enn donskum sleppa ikki inn á dansistøðini, og sera torført er hjá hesum at fáa bústaðir. Hetta hevur verið galdandi í skjótt nógv ár, og hevur avlagað tilveruna hjá nógvum fólki. Tað er lætt at skilja, at nøkur av hesum fólkum, ofta ungir strongdir menn, enda úti í brotsverkum.

Og júst hetta við brotsverkunum hava Poul Nyrup Rasmussen og hansara kumpanar brúkt sum orsøk til at gera útlendingapolitikkin enn strangari, og spreiða enn meira hatur og ræðslu millum vanliga danskaran.

Men nú eru sokallaðu sosialdemokratarnir ikki í stjórn meira. Ein høgra stjórn er komin til valdið, og hendan stendur við einum stórum trupulleika: Hvussu kann hendan stjórnin føra ein meira høgravendan útlendingapolitikk enn tann undanfarna stjórnin gjørdi? Hetta er torført, eftirsum hetta var tann strangasti politikkurin í vestur Evropa.

Fólk eru rødd av øllum ræðumyndunum, sum politikkarar og fjølmiðlar hava málað, og krevja ein harðari politikk. So núverandi danska stjórnin velur at argumentera við, at í arabisku londunum er politikkurin so og so strangur og tí kunnu vit brúka sama politikk yvir fyri arabum. Danska stjórnin velur altso at melda seg úr Vesturevropa á hesum øki. Danska stjórnin velur ein politikk, sum er kendur úr Suður Afrika, úr Irak úr Nazi Týsklandi og Ísrael.

Men vit føroyingar hava ongan áhuga í at melda okkum burturúr Evropa, tí mugu vit siga stopp, og saman við hinum londunum fordøma okkara donsku ríksfelagar.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

## GAMLAR HAVNARMYNDIR

*Lagt til rættis: Birgar Johannessen*



# Í Lon – fyrsta sosiala byggingin í Havn

Hendan myndin er av íbúðunum yvir í Lon í Havn, vanliga kallað »Revagarðarnir«, er tikin í 1950. Hetta er fyrsta sosiala byggjaríið hjá Tórshavnar Kommunu. Ovara Lon hevði fimm íbúðir og Niðara Lon hevði átta íbúðir. Fyrstu fólkini fluttu inn í 1949.

Myndin er tikin frá einum stórum steini niðan móti Frúutrøð, nevndur »Hestahøvdið«.

Norðan fyri Ovara Lon sæst turkihúsið, har tey turkaðu klæði. Niðan fyri tað sæst vaskirúmið, sum hevði kókigrýtu.

Hinu megin Bókbindaragøtu síggjast húsini hjá Jóannes Frederiksen, Johan Slættalíð, Christian Samuelsen (Kiss), Jens Poulsen, Hans Hendrik Jacobsen og Oliver Kragesteen. Vinstrumegin hómast tekjurnar á húsunum hjá Bernhard Arge og Anton Toftalíð. Høgrumegin síggjast húsini hjá Emil Juul Thomsen, og niðan fyri hómast tekjan hjá Hans Nielsen. Úti á Skansanum sæst veðurhúsið, har fók eisini hava búð.

Myndina eigur Kemm Poulsen.




*Soleiðis sá ein Citrónetikett hjá Restorff út í sjeytiárunum…*



# Tá London-bólkurin »The Times« vitjaði í 1968

Í 1968 vitjaði enska orkestrið, The Times, í Føroyum, og hildu teir m. a. konsert í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Hendan myndin er tikin í hesum sambandi, og eru teir 12 menninir aftast frá vinstru hesir: Kári Mouritsen, frásøgumaður, Hans Chr. Clementsen, Finnbjørn Johansen, Jógvan Telling Joensen, Frants Marius Olsen, Sigurd Bech, Birgar Johannessen, Rúni Øster, Niels Símun Johannesen, Jógvan Dahl, Jógvan Sofus Vágsheyg og Símun Arge.

Teir átta í miðjuni eru frá vinstru: Ólavur Øster, Jóannes Nielsen, Marius Joensen á Hvítanesi, Andras Samuelsen, Jógvan Hendrik Johannesen, Finnbogi Johannessen. Tveir lítlir tónleikarar á knøum eru: Kolbein Simonsen og Jógvan Nielsen.

Sitandi fremst frá vinstru eru teir í bólkinum úr London, The Times. Uttast høgrumegin sigur Eirikur Rasmussen.

Myndina eigur Maja Joensen.





*Rótleysi Terji Rasmussen setur búgv í Nólsoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Havnarmaður í Nólsoy

Ein av songfuglunum í Føroyum, sum hevur verið virkin í tónleikinum í mong, mong ár, er Terji Rasmussen. Terji er kendur frá millum øðrum Frændum, Føstufressum og Moirae, har hann hevur havt ein stóran leiklut. Nú er 35 ára gamli havnarmaðurin fluttur úr Keypmannahavn til Nólsoyar, har hann arbeiðir á dagstovninum. Og tað er í Nólsoy, Terji ætlar sær at støðast

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*

Køkurin í Missiónshúsinum í Nólsoy er karmur um samrøðuna við Terja Rasmussen. Missiónshúsið í Nólsoy virkar nú sum dagstovnur hjá 15 børnum frá 0 – 10 ár. Tað er í hesum dagstovninum Terji Rasmussen dagliga starvast, og tað er í Nólsoy, at hann ætlar at seta búgv. Lívið sum trubadurur er komið at enda, og nú er ætlanin at byggja hús í Nólsoy saman við gentuni, og báðum døtrunum. Eisini er ætlanin at fáa egið studio í kjallaran.

Men hvussu ber tað til, at ein havnarmaður, búsitandi í Keypmannahavn, brádliga vendir heimaftur á klettarnar og síðani velur at búseta seg í eini lítlari bygd sum Nólsoy.

– Grundirnar eru nógvar, hví júst Nólsoy er bygdin eg havi valt at búseta meg í, sigur Terji Rasmussen.

– Fyri tað fyrsta, so hava eg og gentan tosað um, at tá vit skuldu flyta heimaftur, so skuldi tað vera til eitt av teimum smærru plássunum nær við Havnina. Mær hevur eisini altíð dámað væl í Nólsoy og mær dámar væl frið. Tað tekur heldur ikki langa tíð at fara til Havnar, og tað er eisini væl bíligari at byggja hús og keypa grundstykki í Nólsoy enn tað er í Havn. Nú havi eg allan mín uppvøkstur sæð Nólsoynna, meðan eg nú ístaðin fyri sleppi at síggja inn á Havnina.

### Stórtrívist

Terji varð útbúgvin pedagogur á læraraskúlanum í januar 1995, og fór í 1998 niður til Keypmannahavnar. Í Danmark arbeiddi Terji á einum viðgerðarheimi fyri ung, sum kanska kann samanberast við Rókina úti á Argjum. Eftir at hava starvast har í tvey ár, valdi hann at gerast fulltíðartónleikari burturav, sum hann sjálvur sigur. Terji leigaði seg inn í eini høli í Herlev, har hann gjørdi sítt egna studio. Í tí studionum vórðu tríggjar fløgur framleiddar, og sum eitt ískoyti byrjaði hann at spæla á náttklubbum og líknandi.

– Men at syngja "Hotel California" á eini barr er "dødens pølse" í longdini, greiðir Terji frá.

– Tí valdi eg at geva mítt trubadur virksemi upp, og flyta heim til Føroya eitt hálvt ár "ov tíðliga". Eg kundi eisini valt at fingið mær arbeiði niðri, fyri síðani at siga upp um eitt hálvt ár, men eg valdi heldur at flyta heim til eitt nýtt lív í Nólsoy.

Songfuglurin sigur, at hann stórtrívist í Nólsoy og nólsoyingar hava tikið væl ímóti sær.

– Eg fari ikki til Havnar uttan so, at eg havi eitt ørindi, sigur Terji.

– Eisini her á barnagarðinum trívist eg væl. Eg hevði ongar forvæntningar til arbeiðið her, so eg eri hvørki vorðin positivt ella negativt yvirraskaður.

Tó sigur Terji, at tað eru tey størru børnini, ið hava tikið best ímóti honum. Tey smærru hava ikki rættiliga vant seg við at eitt mannfólk er komið í húsið enn.

### Rótleysur

– Nú er tað eisini soleiðis, at eg sjálvur helst vil, at míni egnu børn skulu vaksa upp í sama umhvørvi sum eg gjørdi. Føroyar hava eitt nógv sunnari umhvørvi enn tey hava aðrastaðni, har børnini ikki kunnu fara út einsamøll, tá teimum lystir. Men viðhvørt haldi eg, at man gloymir at taka børnini í álvara. "Hatta er bara eitt barn", "Ikki lurta eftir tí børn hava at siga" og so framvegis verður alt ov ofta sagt, sigur Terji Rasmussen

Terji hevur tó sjálvur ta áskoðan, at eitthvørt barn skuldi verið heima, til tað var tvey ára gamalt, og harvið eisini havt annað av foreldrunum heima hjá sær. Men hann leggur tó dent á, at tað er samfelagið, sum vit liva í í dag, sum ger, at hetta ikki er møguligt. Tað eru ikki foreldrini, ið hava skyldina fyri, at tey ikki kunnu vera heima hjá børnunum tey fyrstu árini.

Spurdur, um hann heldur tørvur er á mannligum pedagogum, svarar hann, at tað er tað so avgjørt.

– Eg vóni, at fleiri menn velja at gerast pedagogar í framtíðini. Børn, og kanska serliga dreingir, hava eisini brúk fyri eini mannligari fyrimynd. Kvinnur eru av náttúru meira bangnar av sær, og ofta kann hetta steðga børnunum í at kanna síni egnu mørk. Konur eru meira hjúklutar enn menn. Soleiðis er kynsbýtið nú einaferð, um tú vilt tað ella ei.

Men Terji ætlar sær at støðast í Nólsoy. Tað er í øllum førum ætlanin. Familjan flytir heim í juni, og so skjótt sum liðugt er at útstykkja, verður farið í gongd við at byggja hús.

– Um hetta er mín endastøð veit eg ikki. Eg eri rótleysur og eg slái ikki røtur nakrastaðni. Eg flutti til Danmarkar fyri at sleppa undan føroyingum, men tá eg so endaði mitt á Oyrasundskollegienum, hevði eg meira føroyingar rundan um meg, enn eg hevði havt, um eg hevði eina íbúð í Havn. Men nú eri eg komin í tann aldurin, har eg havi ein etableringstørv. Ommur og abbar eru deyð, mamma býr niðri, so nú er tíðin komin at fáa mítt egna, og tað skal vera í Nólsoy. Eg skal ikki siga, at eg kanska fari burtur eitt ár ella tvey, men eg fari altíð at venda aftur til Nólsoyar.